# Bossurin heldur FCK hava møguleikan



*Leygardagin megnaði FCK javnleik ímóti turkiska toppliðnum, men teir komu ikki í finaluna, tí Todi og ein liðfelagi misnýttu í brotssparkskappingini*

**Leygardagin megnaði FCK javnleik ímóti turkiska toppliðnum, men teir komu ikki í finaluna, tí Todi og ein liðfelagi misnýttu í brotssparkskappingini**

ÚTISETAFELAG
*Jóannes Hansen*

Fýra spælarar eru farnir úr felagnum, og teir hava ongan spælara fingið afturat í summarsteðginum. Kortini heldur formaðurin í FCK, Flemming Østergaard, at liðið hjá honum eigur at hava góðar møguleikar at standa seg í Europa Cup og harvið at hava møguleika at gera gamla dreymin um at røkka bólkaspælinum í europeisku meistarakappingini til veruleika.

–Vit hava møguleikar at klára okkum, men sjálvandi fer tað at koma illa við, um onkrir av lyklaspælarunum verða skaddir, sigur formaðurin og sipar til síðsta kappingarár, tá ið fimm FCK spælarar vóru skaddir í senn og millum teirra Thomas Røll og Martin Albrechtsen.

– Í øllum liðum kemur tað illa við, um landsliðsspælarnir, ið sjálvandi eru millum berandi kreftirnar, verða skaddir, staðfestir formaðurin í FCK, sum kortini ikki heilt sær burtur frá møguleikanum at teir fara at keypa ella selja onkran spælara.

– Um vit fáa eitt kanón tilboð upp á ein av spælarunum hjá okkum, sum vit ikki halda okkum hava ráð at siga nei takk til, so selja vit. Og um okkum fer at standa í boði at keypa ein spælara, sum vit fegnir vilja hava, og tilboðið verður soleiðis, at vit fara at hava ráð til at keypa, so fara vit at smekka til.

Síðstu dagarnar hevur ljóðað í donsku miðlunum, at FCK hevur havt ætlanir um at keypa, og talan hevur verið um álopsspælarar ella kappingarneytar hjá Toda Jónsson. Fyrst ljóðaði, at FCK skuldi keypa Henrik Larsson, svenska álopsspælaran í Celtic, sum seinastu árini hevur verið nógv tann besti álopsspælarin í Skotlandi. Hetta ljóðaði ov gott at vera satt. Sáttmálaskeiðið hjá Henke, sum hann verður róptur, í Celtic verður skjótt liðugt, og tað sigst at fleiri stór feløg í Europa hava eyguni eftir honum. Seinni varð staðfest, at FCK hevur ikki fíggjarligan førleika at vera við í kappingini um so góðan og harvið dýran spælara.

Mikukvøldið spældi FCK í Noregi ímóti Fredriksstad í næstbestu deildini. Todi var ikki við í tí dystinum, sum endaði 3-3. Peter Møller skoraði tvey mál. Aftaná ljóðaði, at FCK serliga hevði fylgt svenska álopsspælaranum hjá Frederiksstad, Marcus Ringberg, við stórum áhuga. Hann er 27 ára gamal, og tað segðist, at FCK er áhugað at knýta hann afturat sær sum avloysara fyri 32 ára gamla Peter Møller, ið ikki verður roknaður at fara at spæla so leingi afturat.

Niels Christian Holmstrøm, ítróttarstjórin í FCK, ásannaði, at teir høvdu hugt eftir svenska spælaranum, og at teir sóu hann sum møguligan makkara há Zuma í FCK álopinum. Holmstrøm segði einki ítøkiligt um tað, men útsøgnin má so eisini hava við sær, at svenski spælarin skal vera alternativ til Toda Jónsson, og at Zuma framvegis verður roknaður sum fyrsta valið til annað álopsplássið.

Útsøgnin hjá Flemming Østergaard sunnudagin hevur við sær, at FCK einki fer at gera við svenska keypið úr Noregi nú beinanvegin.

## Todi misnýtti

Í dýrdarveðrinum seinnapartin leygardagin spældi FCK í Gladsaxe ímóti Galatasaray, sum hevði stóran stuðul frá mælsku turkisku koloniini í danska høvuðsstaðnum og har á leið.

Dysturin var rættuliga javnur, og FCK spældi væl. Todi var sera væl upplagdur. Hann hevði fleiri góðar royndir ímóti málinum, og hann spældi onkra ferðina Zuma leysan. Zuma legði FCK á odda tíðliga í 2. hálvleiki við framúr góðum máli, tá ið hann saksisparkaði aftur um seg sjálvan og dygst inn við stólpanum. Turkiska liðið javnaði til 1-1 tíggju minuttir seinni. Einki mál kom afturat, og so var neyðugt í brotssparkskapping at gera av, hvat av liðnum skuldi spæla finalu í gjárkvøldið. Turkiska liðið misnýtti eitt brotsspark, og FCK misnýtti tvey. Harvið var greitt, at Galatasaray skuldi spæla finalu í gjárkvøldið, og at FCK skuldi spæla ímóti AB.

Todi Jónsson var ein av fimm brotssparksskjúttunum hjá FCK. Todi hevur ofta sagt um seg sjálvan, at hann er einki fyri at skjóta brotsspark, og hann hevur onkra ferðina misnýtt. Hesa ferð sendi hann til høgru fyri seg sjálvan, men tíverri skeivu megin stólpan.

## Søtt minni av Malta

FCK skal í fyrsta umfarinum í nýggja kappingarárinum í superliguni spæla í Aalborg nú leygardagin. Men í løtuni er serligur spenningur knýttur at, um tað fer at eydnast hjá FCK at spæla seg í bólkaumfarið í Europa Cup kappingini fyri meistaralið. Tað er har, at tað er møguleiki at vinna nógvar pengar.

Enn er ikki greitt, hvat fyrsta mótstøðuliðið hjá FCK, sum skal spæla í næsta innleiðandi umfarinum, verður. Tað verður avgjørt í annaðkvøld. Tá skal Skonto Riga, sum í 1992 var mótstøðulið hjá KÍ í Europa Cup, spæla á heimavølli ímóti maltesiska meistaraliðnum Sliema Wanderers. Tað var ikki, sum tað frammanundan varð roknað við, tá ið maltesiska liðið síðsta mikukvøld á heimavølli vann 2-0 ímóti Skonto Riga. Undan tí dystinum roknaði FCK venjarin, Hans Backe, við, at letlendska liðið var favorittur.

Um FCK skal spæla á Malta ella í Letlandi, so kemur Todi Jónsson til eitt land, har hann áður hevur roynt seg. Í 1992 tapti KÍ 3-0 í Riga. Í 1997 var Todi við landsliðnum á Malta. Tann dysturin var ikki spældur á heimavøllinum hjá Sliema, sum eitur Hibernians Ground, men á Ta'Qali tjóðarleikvøllinum í Valletta, har Føroyar vunnu 2-1. Seinna málið skoraði Todi Jónsson við rimmar langskoti stutt undan dystarenda.

Fyrri dysturin hjá FCK í næsta innleiðandi umfarinum verður longu mikukvøldið í næstu viku. Hvørjum FCK fer at spæla ímóti í triðja innleiðandi umfarinum, um teir, sum tað eigur at vera rættuliga sannlíkt, fara at fella mótsrøðuliðið í øðrum umfari, er ikki greitt enn. Men tað er greitt, at tað verður eitt væl betri lið, enn tey omanfyri nevndu. Tað eru tvey ár síðani, at FCK síðst stóð á gáttuni til bólkaumfarið og stóru ítróttarligu avbjóðingarnar og nógvu pengarnar, men ta ferðina miseydnaðist tað. Italska Lazio við Dino Zoff sum venjara var ov stórur biti hjá FCK. Todi Jónsson var ikki á liðnum ta ferðina. Hann var skaddur.

Næstu vikurnar fara at vísa, um orðini hjá Flemming Østergaard um, at liðið hjá honum hevur nóg góða manning at standa seg í Europa Cup, fara at gerast til veruleika.




# EDV-starv í Klaksvík

Gjaldstovan hevur um hendi Landsroknskapin, Búskaparskipan landsins og ein stóran part av almenna bókhaldinum. Á gjaldstovuni arbeiða uml. 30 fólk.

Á deildini fyri kervisfyrisiting av Búskaparskipan landsins eru 4 fólk. Leiðarin á deildini starvast í Klaksvík og arbeiðir í bygninginum, sum ætlaður er almennu fyrisitingini í Norðoyggjum. Í hesum sama bygningi eru eisini almannastovudeildin og toll- og skattstovudeildin. Bygningurin verður í løtuni munandi umbygdur, so hann kann verða karmur um eitt nútímans skrivstovuumhvørvi.

Kjarnin í Búskaparskipan landsins er standardroknskaparskipanin Oracle Financials. Av øðrum skipanum undir Búskaparskipan landsins kunnu verða nevndar:

- Felags lønarskipanin, sum verður karmur um útgjaldingar av øllum almennum lønum.
- Búskettskipanin, sum er karmur um fíggjarlógararbeiðið hjá landinum.
- Dátugoymsluhúsið, sum nú er sett upp, og sum skal verða grundarlag undir eini størri framleiðslu av leiðslukunning.

Meira um hetta er at lesa á heimasíðuni hjá gjaldstovuni.

Í løtuni nýta okkurt um 200 brúkarar Búskaparskipan landsins.

Heimasíða: www.gjaldstovan.fo



## Starv á EDV-deildini á gjaldstovuni í Klaksvík er leyst at søkja.

Ert tú tann rætti/rætta, so kunnu vit bjóða tær eitt spennandi starv, eitt arbeiðsumhvørvi við nútímans amboðum og skipanum og eitt starv, sum er mennandi bæði fakliga og persónliga.

Ábyrgdarøkið verður at hjálpa kervisfyrisitingini at reka EDV-skipanirnar og netfyrisitingini at knýta stovnar í EDV-skipanirnar hjá gjaldstovuni, t.e. at leggja inn forrit og seta upp samskifti.

Seinni, so sum evni og áhugi eru, verður arbeiðið meira avbjóðandi. Her verður hugsað um t.d. ábyrgd av ávísum uppgávum í kervisfyrisiting og at menna smærri uppgávur.

Tær nýtist ikki at hava formliga ella ávísa útbúgving, men tú ert tað ein fyrimunur at hava eina útbúgving á økinum og at duga tey mest nýttu forritini so sum office-pakkan og at kenna til stýriskipanir. Eisini er gott, um tann, ið settur/ur verður, hevur skil fyri bókhaldi. Ert tú júst vorðin HH-ari, so er hetta kanska tað rætta starvið.

Í upplæringartíðini verður miðað eftir, at viðkomandi so við og við skal kunna átaka sær størri og spennandi uppgávur. Ein týdningarmikil táttur í útbúgvingini er at læra virkisøkini á gjaldstovuni at kenna, so tú kanst fáa yvirlit yvir funktiónir, arbeiðshættir og samskifti millum skipanir. Av hesi orsøk fert tú eina slaka helvt av tíðini fram til jóla at skiftast um at arbeiða í Klaksvík og í Tórshavn.
Ynskir tú at útbúgva teg víðari t.d. til HD ella datanom, so er gjaldstovan positiv fyri hesum og vil verða við at skapa tær útbúgvingarmøguleikar.

Lønar- og setanartreytir verða samsvarandi sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og viðkomandi yrkisfelag.

Umsóknir skulu vera Føroya Gjaldstovu, boks 2009, 165 Argir, í hendi innan 4. august 2003.

Dávur Johannesen á telefon 352400 ella 212441 er fúsur í viku 29 og 31 at svara spurningum starvinum viðvíkjandi.



# Citröen Jumpy 1.9 TD



Sera vælhildin vøruvognur
Innrættaður til handverkara
Til sølu um hóskandi boð fæst.
Ár: 1999
Km: 69.000
Ringið tlf. 371937 - 211937

Birgir Dimon



# Pedagogar og hjálparfólk

## til Frítíðarskúlan í Fuglafirði

Til Frítíðarskúlan verður søkt eftir 3 pedagogum og einum hjálparfólki 35 t. viku, at byrja 15. aug. 2003. Størvini eru á stovni við 52 børnum í 1. og 2. flokki.

Lønin verður sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag/Fíggjarmálaráðið og kommunurnar.

Nærri upplýsingar um størvini fáast við at venda sær til leiðaran á dagstovninum, tlf. 227385 ella 444355.

Umsóknir saman við avritum av prógvum og viðmælum skulu vera býráðsskrivstovuni í hendi í seinasta lagi 01. august 2003 kl. 10.00.

Býráðið skilar sær rætt til at velja millum innkomnu umsóknirnar ella onga at taka.

*Fuglafjørður, 16. juli 2003*
**Fuglafjarðar kommuna**



# Góðir brúktir bilar

| | |
|---|---|
| **Nissan Almera 2.0 diesel** grønur, árg 1999, 4 hurðar — 115.000 | **Saab 9-3 Tid 2.2 115 HK** bláur, árg 1998, 5 hurðar, km. 117.000 — 155.000 |
| **Nissan Almera 2.0 D, Nordic** bláur, árg 1999, 4 hurðar, km. 46.000 — 118.000 | **Saab 900 2.0 128 HK** grønur, árg 1991, 4 hurðar — 50.000 |
| **Nissan Almera 1.6 GX** vínreyður, árg 2000, 4 hurðar, km. 88.000 — 115.000 | **Citroen Xsara 1.8 Coupe** gulur, árg 1998, km. 84.000 — 79.000 |
| **Nissan Primera 2.0 LX** koboltbláur, árg 1997, 4 hurðar, km. 63.000 — 92.000 | **Ford Escort 1.8** svartur, árg 1998, 5 hurðar, km. 123.000, fyrr 85.000,- — nú 74.000 |
| **Peugeot 306 Diesel** grønur, árg 1996, km. 155.000, fyrr 75.000,- — nú 70.000 | **Mazda 323 1.5** bláur, árg 2001, 3 hurðar, km. 22.000 — 118.000 |
| **Peugeot 306 Diesel** bláur, 5 hurðar, km. 203.000 — 65.000 | **Mitsubishi Carisma 1.6** árg 1996, 5 hurðar — 88.000 |
| **Peugeot 306 Diesel** bláur, árg 1996, 4 hurðar, km. 130.000, fyrr 65.000,- — nú 55.000 | **Kia Sephia 1.5** bláur, árg 1997, 4 hurðar, km. 89.000 — 55.000 |
| **Peugeot 405 GTX 2.0** hvítur, árg 1995, 4 hurðar — 47.000 | **Ford Sierra 1.8 DT** vínreyður, árg 1993, 4 hurðar — 45.000 |
| **Peugeot 406 ST 2.0 Hdi v/aircon** vínreyður, árg 1999, 4 hurðar, km. 120.000, fyrr 154.000,- — nú 145.000 | **Skoda Octavia 1.6 v/aircon** bláur, árg 2000, 4 hurðar, km. 48.000 — 105.000 |
| **Peugeot 605 2.1 DT Aut.** bláur, árg 1994, 4 hurðar — 79.000 | **Ford Escort Van 1.8 Diesel** gráur, árg 2000, 3 hurðar, km. 74.000, nýsýnaður — v/mvg 68.000 |
| **Peugeot Expert 1.9 DT** gráur, árg 1999, — 110.000 | **Rover 600 TD** gráur, árg 1998, 4 hurðar, km. 115.000 — 179.000 |
| **Opel Astra 1.7DT St. car** reyður, árg 1999, 5 hurðar, km 52.000, fyrr 115.000,- — nú 110.000 | **Daewoo Lanos 1.5** reyður, árg 1999, 5 hurðar, km. 53.000 — 79.000 |
| **Opel Astra 1.6 v/aircon.** bláur, árg 1998, 5 hurðar, km. 41.000 — 98.000 | **VW Polo Classic SDi** bláur, árg 1998, 4 hurðar, km. 71.000 — 89.000 |
| **Opel Astra 1.6 16V Stc.** gráur, árg 1999, 5 hurðar — 110.000 | **Toyota Carina E 1.6** hvítur, árg 1995, 4 hurðar, km. 138.000 — 67.000 |
| **Opel Astra 1.4** bláur, árg 1992, 5 hurðar, km. 145.000 — 39.000 | **Toyota Corolla 2.0 Diesel** blágráur, árg 1998, 4 hurðar, km. 197.000 — 88.000 |
| **Opel Astra 1.7DT** grønur, árg 1997, 4 hurðar — 65.000 | **Toyota Corolla 2.0 D Stc.** vínreyður, árg 1995, 5 hurðar, km. 110.000 — 79.000 |
| **Opel Astra 1.6 Elegance Stc.** gráur, árg 2001, km. 21.000 — 165.000 | **Toyota Land Cruiser 90 Vøruvognur** grønur, árg 1997, 3 hurðar, km. 156.000 — 158.000 |
| **Opel Vectra 2.0Dti** svartur, árg 1999, 4 hurðar, km. 135.000 — 149.000 | **Toyota Land Cruiser van** reyður, árg 1986, 5 hurðar, km. 330.000 — 42.000 |

Gevið gætur: Bilarnir á listanum kunnu verða seldir
Bilarnir finnast eisini á: www.nissan.fo

P/F Meinhardt Arge
v/ Oyggjarvegin • Postsmoga 3171 • 110 Tórshavn • Tel. 31 61 61

Sosialurin 341800